# Javnaðarflokkurin stillar upp til fólkatingsvalið

**Skrivarin hjá tingmanning Javnaðarfloksins, Jens Jóhan Dam og valdi skrivari floksins, Katrin Dahl Jacobsen, vátta, at Javnaðarflokkurin fer at stilla upp til fólkatingsvalið**

FÓLKATINGSVAL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Líkt er ikki til, at nakar ivi er um, at Javnaðarflokkurin verður millum flokkarnar, sum fara at stilla upp til fólkatingsvalið komandi, og ætlanin er í størst møguligan mun at stilla upp um alt landið.

Tað eydnaðist ikki at fáa fatur á Jóannesi Eidesgaard, løgmanni, fyrrapartin í gjár, tí hann var á oljuráðstevnu.

Sosialurin tosaði við Jens Jóhan Dam, sum er skrivari hjá tingmanning Javnaðarfloksins, og hann váttaði, at flokkurin fer at stilla upp.

Hann sigur, at hóast eingin formell avgerð er tikin um hetta, liggur tað í kortunum, at Javnaðarflokkurin verður millum flokkarnar, sum stilla upp til hetta fólkatingsvalið.

– Tað vildi verið undarligt, um vit ikki stillaðu upp, heldur hann.

Jens Jóhan Dam væntar, at flokkurin í størst møguligan mun fer at stilla valevni upp um alt landið.

### Katrin í Noregi

Vit fingu eisini fatur á Katrin Dahl Jacobsen, sum er valdur skrivari í Javnaðarflokkinum, men hon var júst stødd á fundi í Noregi og hevði ikki møguleikar at gera viðmerkingar til, hvørji mál Javnaðarflokkurin fer at leggja dent á í komandi valstríði.

Men greitt er so, at Javnaðarflokkurin verður millum flokkarnar, sum stilla upp til fólkatingsvalið, sum – í skrivandi løtu – ætlandi verður, 8. februar.

Vit fara at venda aftur til Javnaðarflokkin í hesum samanhangi.



*Sum skilst,verður tað Katrin Dahl Jacobsen, valdur skrivari í Javnaðarflokkinum, sum fer at standa fyri høvuðsábyrgdini av valstríðnum hjá Javnaðarflokkinum hesaferð*

# – Mær dámar væl tað uttanríkispolitiska

**Edmund Joensen er rættiliga spentur til komandi fólkatingsval. – Mær dámar væl tað uttanríkispolitiska, og eg haldi, at hesin áhugi er viðføddur, sigur Edmund, sum í 1994 varð fyrst valda føroyska umboðið á fólkatingi, men gjørdist løgmaður og tískil bert hevði sæti á fólkatingi í nakrar fáar vikur**

FÓLKATINGSVAL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Norðuri á Oyri situr ein royndur politikari, tingformaður, fyrrverandi løgmaður og valdur fólkatingsmaður.

Eitt kent andlit í politikki, ein blíður og fyrikomandi maður.

Edmund Joensen er spentur til fólkatingsvalið, og hann drálar ikki, tá ið vit spyrja, um hann letur seg stilla upp.

– Jú, eg stilli upp til hetta fólkatingsvalið. Valfelagið í Eysturoy hevur millum onnur heitt á meg um at stilla upp, og eg havi gjørt av at taka við hesum áliti.

Í 1994 gjørdist Edmund Joensen fyrst valda føroyska umboðið á fólkatingi, men hann sat bert nakrar fáar vikur í hesum sessi, tá ið hann gjørdist



*Edmund Joensen dylur ikki fyri, at hann er spentur til hetta fólkatingsvalið. - Gjøgnum árini sum politikari havi eg gjørt sær nógvar royndir, og eg havi nógv góð sambond í Danmark, sum kunnu vera mær til hjálpar, um eg verið valdur, sigur hann*

løgmaður og læt sessin frá sær til næsta mann, Jóhannes Martin Olsen.

- Eg havi altíð brent fyri tí uttanríkispolitiska, og tað liggur í mær at vilja royna hesi tingini av – og koma Føroyum fram, sum hann tekur til.

Hann heldur, at áhugin fyri uttanríkispolitikki er viðføddur.

Edmund sigur, at gjøgnum árini sum politikari hevur hann gjørt sær nógvar royndir, og hann hevur nógv góð sambond í Danmark, sum hann metir kunnu verða honum til hjálpar, um hann verður valdur á fólkating.

### Høvuðsmálini

Spurdur, hvørji hann væntar, at høvuðsmálini verða í komandi valstríði, sigur hann:

– Eg vænti, at valevnini í flestu førum fara at fokusera upp á tað vanliga, sum er uppi til eitt slíkt val – ríkisrættarligu støðuna og so tað búskaparliga, sum er tengt at hesum. Hesi mál eru náttúrliga altíð frammi til eitt fólkatingsval.

Edmund væntar eisini, at yvirtøkulógin og uttanríkisheimildirnar fara at gerast ein partur av valstríðnum.

– Hetta verður eitt stutt valstríð, og tað dámar mær væl, tí í politikki er valstríð næstan alla tíðina. Í einum longum valstríði gerast bæði valevni og fólk sum heild troytt, og tá fara viðurskiftini í longdini ofta at snúgva seg um lítið viðkomandi og kunstig mál, sum eru uppi júst í tí tíðini.

Hann sigur seg hava varhugan av, at valstríðið hesaferð verður tamt, men væntar, at tað eisini fer at snúgva seg um føroysku umboðanina á fólkatingi, eitt nú við atliti til Norðuratlantsbólkin.

Av øðrum málum væntar Edmund, at flogvøllurin verður tikin fram, tí hetta er eitt mál, sum leingi hevur ligið at láni at loysa.

– Tíðin er komin til at loysa flogvallarmálið, sum hastar fyri føroyingar.

Edmund harmast um, at Mærsk, sum hevur havt flúgving hendanvegin í mong ár, hevur tikið seg aftur á rutuni. Hann heldur, at hetta í longdini kann fara at ganga út yvir tænastuna og ferðaseðlaprísirnar.

– Eg veit ikki, um afturtøkan hjá Mærsk skyldast flogvallarviðurskiftini meira enn stirvnu kappingartreytirnar, sum landsstýrið setir, men skulu vit í framtíðini hava størri kapping á Føroyarutuni og røttu ferðaseðlaprísirnar, er alneyðugt, at flogvøllurin lýkur altjóða krøv.

Hann vísir á, at tað er umráðandi fyri føroyingar við eini møguligari yvirtøku av flogvøllinum, at tað verður ein "uppdateraður" flogvøllur, sum verður yvirtikin.

### Vinnan í aldudali

Edmund Joensen væntar eisini, at vinnupolitisku málini verða drigið upp í valstríðið.

– Sum heild hevur vinnan tað ikki so gott í løtuni, sum hon hevur havt tað seinastu árini, og líkt er ikki til, at afturgongdin er steðgað. Vit sóu, hvussu tungt tað var at fáa fíggjarlógina at hanga saman hesaferð.

Hann harmast serliga um gongdina í alivinnuni og rækjuvinnuni.

– Vit vóru komnir upp ímóti miljardini í útflutningi í alivinnuni, og vit høvdu eitt stórt potentiali til at økja munandi um hesa vinnu og teir ringvirkningar, sum ein slík vinna hevur við sær. Potentialið lá eitt nú í meirvirking av laksavørum, sum vit í dag síggja gevur bæði arbeiði og pening.

Edmund leggur dent á, at alivinnan – um hon ikki var farin so illa – hevði verið eitt kærkomið bein hjá føroyska samfelagnum at staðið á aftrat, tá ið vit vita, at tað altíð verður upp og niðurgongd í fiskivinnuni annars.

- Rækjuflotin er tódnaður niður í 5 skip, og ísfiskaflotin gremur seg um, at tungt er at fáa endarnar at røkka, nú fiskaprísirnir hava verið so lágir, samstundis sum olju-og agnprísir eru øktir. Haraftrat gremjur fiskivinnan á landi seg um vantandi kappingarføri.

Hann heldur tó, at árið í fjør neyvan er lakari hjá ísfiskaflotanum enn eitt miðal ár.

- Men nú høvdu vit vant okkum við, at tað gekk so væl hjá ísfiskaflotanum seinastu árini – við góðum fiskiskapi og góðum fiskaprísum. Tí kennist afturgongdin so ógvuslig, heldur Edmund Joensen.